Cafe Natúr seld

1. septmember eitur eigarin av Cafe Natúr ikki longur Turid Samró. Hon hevur valt at selja cafeina, men ta› hevur einki at gera vi› starvsfólkaroki› á cafeini í farnu viku, sigur hon

RÚNAR REISTRUP

– Hatta er mítt lívsverk. Eg havi arbeitt cafelívi› í b‡num upp frá ongum til ta›, sum ta› er í dag. Eg fái ein gó›an prís, nú eg selji cafeina, og eg fái eitt her›aklapp fyri ta› strí›i›, sum eg havi lagt í Cafe Natúr, seg›i Turid Samró, tá vit hittu hana á máli á middegi í gjár.

Eftir at hava stovna› cafeina í 1992 og riki› hana sí›an, hevur Turid Samró nú valt at selja Cafe Natúr, bæ›i av heilsuávum og av tí at møguleikin fyri at fáa gó›an keypara og gó›an prís nú b‡st.

– Eg havi veri› í sjúkrafarloyvi nú í meira enn eitt ár, og havi alla hesa tí› veri› opin fyri keypstilbo›um. Ta› eru átta mána›ir sí›an samrá›ingarnar vi› keyparan byrja›u, og nú eru vit so endiliga komin á mál, sigur Turid.

Hør› byrjan

Hon sigur, at raksturin av cafeini ikki hevur kasta› so nógv av sær, men nú hon selur, gevur ta› henni nógvar pengar

– Ta› hevur veri› heilt øgiliga hart at riki› hesa cafeina. Eg var n‡útbúgvin, sat í n‡ggjum húsum vi› trimum smáum børnum, tá eg byrja›i hetta virki›. Alt var fari› á húsagang og lá í skeljasori í Føroyum tá, og tí bar ikki til at fáa naka› lán, tá eg kom til bankan og seg›i, at eg ætla›i at opna eina cafe. Har var bara kortanei, grei›ir Turi› frá.

Cafe Natúr læt upp 7. juli í 1992. Tá hev›i Turid bæ›i klædnahandil og cafe í húsunum. Men cafevirksemi› fór at krevja meira pláss og meira orku, og í 1996 var› handilin latin aftur og plássi› brúkt til cafebor› og stólar.

Sølan ikki ávirka› av rokinum

Vi› árunum er cafein vor›in rættiliga væl umtókt og hevur sett sín dám á b‡in.

Farnu vikuna hevur nógv veri› at hoyrt um cafeina av heldur døprum tí›indum, tá ellivu starvsfólk vór›u uppsøgd vegna lønarstrí›, og dagligi lei›arin á cafeini sí›an seg›i seg úr starvi.

Men hetta hevur sambært Turid einki vi› søluna at gera.

– Eg hev›i avgjørt at selja cafeina frammanundan tí sum hendi í sí›stu viku, og eg kann eisini siga so miki› sum, at ta› ikki hevur ávirka› keypsprísin.

Spurd um hvør keyparin av Cafe Natúr er, vil Turid ikki nevna nakran ítøkiligan.

– Eg kann bara siga, at ta› er fantastiskt at kunna avlevera Cafe Natúr til teir keypararnar, sum nú yvirtaka hana og føra mítt lívsverk ví›ari. Ta› kundu ikki veri› betri fólk, i› skulu føra ta› ví›ari, sigur Turid Samró og leggur skjótt afturat, at ta› ikki er Føroya Bjór.

Føroya Bjór eigur sjálv húsini, har Cafe Natúr heldur til. Tískil eru ta› ikki húsini, i› nú ver›a seld, men sjálvt virki› Cafe Natúr.

Nú ætlar Turid sær á Fró›skaparsetri› at lesa, men hon útilokar ikki, at hennara navn fer at standa sum eigari av onkrum ø›rum virki – møguliga einari a›rari cafe. Men sum er, liggur einki fast.

– Nú eri eg bara gla› fyri at eg fái tí› til at fáast vi› anna› enn cafeina, sigur Turid Samró, i› 1. september gerst fyrrverandi stjóri á Cafe Natúr.

Teletí› loysir seg bert hjá teimum fámæltu

N‡ggja fartelefonhaldi› hjá Føroya Tele, Føroya Teletí›, loysir seg bert hjá teimum fáor›a›u. Tí tosar tú meira enn tr‡ korter um mána›in í sjálvvaldum samrø›um, er Teletí›in tann d‡rara loysnin

RÚNAR REISTRUP

Í gjár bar fyri fyrstu fer› til at tosa í eina føroyska fartelefon, uttan at fáa telefonrokning sendandi aftaná.

Hetta ljó›ar bara gott í oyrunum á teimum, i› halda, at 115 krónur í mána›argjaldi er naka› nógv at gjalda bara fyri at hava eina GSM telefon.

N‡ggja fartelefonhaldi› hjá Føroya Tele har brúkararnir sleppa undan telefonrokningini, hevur fingi› navni› »Føroya Teletí›«.

Í l‡singarherfer› skrivar Føroya Tele, »Sig ta› uttan rokning« og sum fyrimunir nevnir telefyritøkan, at telefonfelagin ikki skal rinda mána›argjald, ikki fær telefonrokning og ikki hevur óvænta›a n‡tslu.

Ta› sum l‡singin ikki sigur frá er, at ta› harafturímóti kostar meira enn tvífalt so nógv at tosa í telefon vi› Føroya Teletí› enn vi› vanligum GSM haldi.

Og ver›ur havt í huga, at minuttprísurin fyri GSM fartelefonir ikki er so lítil sum er, so ljó›ar tvífalda›ur minuttprísur sum ein nokkso stór upphædd.

N‡tslan avger› máli›

Ein samrø›a ígjøgnum eina GSM telefon vi› vanligum haldi, kostar 2 krónur og 40 oyru um minuttin um tosa› ver›ur um dagin.

Hevur telefonin n‡ggja »Teletí›« haldinum kostar hvør minuttur í dagtímunum 5 krónur.

Uppringingargjaldi› er ta› sama vi› bá›um telefonhaldunum, men SMS bo›ini eru 50 oyru d‡rari at senda, hevur tú Teletí›.

Orsøkin til at ta› hjá onkrum kann loysa seg at hava teletí› er, at fyri vanligt GSM hald skalt tú gjalda 115 krónur um mána›in. Vi› Teletí› er einki mána›argjald.

Ta› er vi› ø›rum or›um hvussu nógv tú brúkar telefonina, i› avger›, um ta› loysir seg at gjalda tær 115 krónur um mána›in fyri at fáa lægri minutttakst, ella um ta› heldur loysir seg at gjalda 5 krónur um minuttin, og afturfyri sleppa undan mána›argjaldinum.

Marki› er tr‡ korter

Men ta› er bert fyri tey mest fámæltu, at ta› kann loysa seg at hava teletí›arhald heldur enn vanligt hald, tí tosar í fartelefon í tr‡ korter um mána›in, so eru fyrimunirnir vi› teletí›ini longu farnir av bankabókini.

Tr‡ korter, ella 45 minuttir, vi› dagstaksti kosta nevniliga 225 krónur vi› teletí›arhaldinum, har minuttprísurin altso er 5 krónur.

Somu 45 minuttir kosta bert 108 krónur í minutttaksti, hevur tú vanligt GSM-hald. Harafturat skal mána›argjaldi› á 115 krónur leggjast afturat kostana›inum, sum solei›is gerst 223 krónur.

Um ta› loysir seg at hava Føroya Teletí› ella vanligt fartelefonhald stendur og fellur altso vi›, um sjálvvaldu samrø›urnar ígjøgnum telefonina samla›ar ígjøgnum ein mána› eru longri enn tr‡ korter.

Ta› svarar til hálvanannan minutt um dagin, og tí er Teletí›in bert ein fyrimunur hjá teimum, i› eru fámælt, tá tey tosa í fartelefon – ella hjá teimum, i› lata onnur ringja til sín, men ikki ringja so nógv sjálvi.

Bíligari um kvøldi›

Í sambandi vi› prísmunin á teimum bá›um undannevndu haldunum, er vert at leggja til merkis, at útrokningarnar í greinini bert eru galdandi fyri dagstakst. Ver›ur fartelefonin n‡tt nógv um kvøldi›, kann ta› loysa seg at hava Teletí›arhald, hóast ein tosar í meira enn tr‡ korter um mána›in.

Ta› skal eisini nevnast, at ta› netto er 447 krónur d‡rari at stova eitt vanligt GSM hald enn eitt Teletí›arhald.

Sjálvur minuttprísurin fyri Føroya Teletí› er tann sami, sum Tele Danmark tekur fyri sítt líknandi talutí›arhald. Ein av teimum bíligari, men ikki so væl útbreiddu, veitarunum í Danmark, Debitel, tekur 3 krónur og 50 oyru um minuttin fyri talutí›arhald.